# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

**Svarari:** Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

**Evni:** Hjálparpakki til fíggjarliga sperdar uppihaldarar og pensjonistar

**Spurningar:**

1) Ætlar landsstýrismaðurin at veita fíggjarliga hjálp til stakar uppihaldarar, barnafamiljur og pensjonistar, nú prísvøksturin heldur fram?
2) Arbeiðir landsstýrið við ætlanum um, hvussu ein møgulig hjálp kundi verið skipað?
3) Um nei, hvat er orsøkin, og hvussu høgur skal prísvøksturin vera, áðrenn stig verður tikið til at veita hesum bólkum eina hjálpandi hond?

**Viðmerkingar :**

Príshækkingin á gerandisvørum er ógvuslig. Inflatiónin í okkara parti av heiminum er tann hægsta í 40 ár. Her heima vaks brúkaraprístalið við góðum 4 % í februar. Støðan er ikki batnað seinastu mánaðirnar - heldur tvørturímóti.

Landsstýrismaðurin hevur áður upplýst fyri Løgtinginum, at hann ikki hevur ætlanir um nakran hjálparpakka til familjur og pensjonistar, ið eru fíggjarliga sperd.

Fyri kortum hava fleiri, m.a. formaðurin í Búskaparráðnum, mælt til at geva eina hjálpandi hond til tey, ið fíggjarliga eru ringast fyri orsakað av príshækkingunum.

Mælt verður til at gera eina tíðaravmarkaða og einfalda skipan, ið er málrættað til lægstu inntøkubólkarnar. Tí er áhugavert at vita, um landsstýrið fyrireikar og hevur ætlanir um átøk.

Í okkara grannalondum hava tey við lægstu inntøkunum og pensjonistar fingið fíggjarliga hjálp.

Landsstsýrið hevur hjálpt ymiskum bólkum, meðan korona herjaði, og tí kann tað undra, at eingin hjálp er at hóma í hesum tíðum, tá eitt nú stakir uppihaldarar, barnafamiljur og pensjonistar hava avbjóðingar við at fáa gerandisdagin at ganga upp fíggjarliga.

**Á Løgtingi, 19. mai 2022**

Eyðgunn Samuelsen